## Flogbóltsfelag á veg

Um eina til tvær vikur verður stovnandi aðalfundur í einum nýggjum flogbóltsfelag á Toftum. Talan er tó ikki um ein kappingarneyta til flogbóltin hjá B68, men heldur, at flogbólturin á Toftum frameftir verður í sínum egna felag. B68-heimasíðan veit at siga, at skrivað er út ein kapping um, hvat navn nýggja felagið skal hava.



## Ung boðin til Italia

Flogbóltssambandið hevur úr Milano í Italia fingið sendandi innbjóðingar til páskakappingar, sum verða fyri yngri gentulið. U13- og U14-gentulið skulu kappast í Torino 1. og 2. apríl, U18-gentur nærhendis Verona tann 5. apríl, og U14-, U16- og U18-gentur eru bodnar við til kappingar á einum staði nærhendis Brescia og Bergamo, sum verða 4. og 5. apríl.

# Millum heimsins bestu

**Kvinnulandsliðið í fótbólti skal um ein mánað til stóra kapping í Portugal, har øll tey bestu landsliðini í heiminum eru við. Føroyar skulu kappast við Portugal, Rumenia og Eysturríki**




Hilmar Jan Hansen

Hóast tað er í hesum døgum, at kvinnuliðini í fremstu fótbóltsdeildini so smátt fara undir venjingina aftur, hava nógvar av kvinnunum verið í gongd í tveir mánaðir. Tað eru tær, sum eru á landsliðnum, tí tær hava verið í gongd tvær til tríggjar ferðir um vikuna síðani síðst í november.

Umframt, at landsliðsspælararnir hava vant saman, hava teir eisini vant hvør sær, so tí man tað koma væl við í fyrireikingunum til komandi landsliðsuppgávuna, at feløgini eisini fara í gongd nú.

Avbjóðingin, ið stendur fyri framman, er ein hin største nakrantíð hjá einum føroyskum kvinnulandsliðið, tí Føroyar skulu um ein mánað við til eina sterka kapping í Portugal, Algarve Cup, har øll tey bestu kvinnulandsliðini í heiminum eru við.




Landsliðskvinnurnar í fótbólti skulu um ein mánað við til kapping í Portugal, har heimsins bestu kvinnulandslið eisini eru við
Mynd: FSF

### Øgilig avbjóðing

Føroysku kvinnurnar koma tó ikki at møta USA, Týsklandi, Kina ella Norra, men skulu kappast við Portugal, Eysturríki og Rumenia, ið øll eru væl við. Rumenia og Eysturríki eru styrkimett sum ávikavist nummar 21 og 22 í Europa, Portugal sum nummar 25 og Føroyar sum nummar 35.

– Hetta er ein øgiliga stór avbjóðing, men væntandi eisini ein stór uppliving. Ikki minst, tí okkara spælarar hesar dagarnar verða partur av einum fótbóltsumhvørvi, ið telur teir avgjørt bestu spælararnar í heiminum, hevur Álvur Hansen, landsliðsvenjari hjá kvinnulandsliðnum, fyrr sagt fyri Sosialinum.

Føroyska kvinnulandsliðið er ikki við í komandi HM-undankappingini, so tí kemur tað væl við, at liðið í staðin fær henda møguleikan.

Í kappingini í Algarve spæla Føroyar ímóti Portugal mikudagin 24. februar, ímóti Eysturríki fríggjadagin 26. februar og ímóti Rumenia mánadagin 1. mars.

## Finalistarnir ymsar blusur

Flogbóltssambandið boðar nú frá, at tá steypafinalurnar í flogbólti verða spældar leygardagin 20. februar, skulu liðini ikki hava blusur við sama liti. Víst verður á eina aðalfundarsamtykt frá í fjør, sum sigur, at finaluliðini skulu hava hvør sín búnalit.

Hjá teimum, sum eru til staðar í høllini á Hálsi finaludagin, er kanska ikki so torført at síggja mun á liðunum, um blusurnar hava sama lit, men verri er hjá teimum, ið sita heima í stovuni og hyggja at dystunum í sjónvarpinum.

Lutakast hevur eisini verið um, hvørji lið hava heimavøll, og tað tørnaði soleiðis út, at hjá kvinnunum hevur SÍ heimavøll ímóti Drátti og hjá monnunum hevur Mjølnir heimavøll ímóti SÍ. Liðið, sum hevur heimavøll, avger sín egna blusulit, og so má útiliðið laga seg eftir tí og fara í blusur við øðrum liti.

hil

## Mjølnir-ÍF 3-0 (25-21, 25-18, 25-9):

# Klaksvíkingar koyra á

**Nú øll liðini í Eik-liguni hjá monnum hava spælt 12 dystir, er Mjølnir aftur trygt á odda – trý stig framman fyri SÍ og sjey stig framman fyri Fleyr**




Hilmar Jan Hansen

Enn bíða fuglfirðingar eftir sínum fyrstu stigum hetta kappingarárið. Og tá teir í gjárkvøldið vitjaðu Mjølnir í Klaksvík, var tað bara í fyrsta settinum, at teir vóru so frægt við, at teir kundu hótt oddaliðið.

Hetta var tað javnasta og mest spennandi av teimum trimum settunum, og ÍF fylgdi so mikið væl við, at støðan var 20-20, áðrenn Mjølnir fekk sett endaspurtin inn og vunnið settið við fýra stigum.

Í øðrum setti byrjaði Mjølnir at líkjast meira oddaliðnum, og tað var ikki leingi, at ÍF fekk hingið í. Og tá so liðini komu til triðja sett, var allur ivi burturbeindur, tí Mjølnir kom framum 7-0 og rann annars avstað.

Ikki er tann stóri spenningurin í manskappingini í flogbólti, men tað kann so skjótt gerast øðrvísi. Leygardagin skal Mjølnir til Sørvágs at spæla ímóti SÍ, sum tykist vera komið fyri seg. Vinnur SÍ, er bara eitt stig millum liðini, men vinnur Mjølnir, økist munurin upp í fimm. Í hinum dystinum, sum verður sunnudagin, møtast Fleyr og ÍF.

Eftir hesar báðar dystirnar um vikuskiftið verða stigini koyrd í helvt, so tá fæst at síggja, um nakar munur verður á ella ikki.



Við einum sannførandi 3-0 sigri á ÍF øktu oddamenninir hjá Mjølnir í gjárkvøldið aftur frástøðuna til SÍ
Savnsmynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

## Flogbóltur

**Eik-ligan, menn**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 12 | 10 | - | 2 | 32 | 11 | 21 | 13 |
| 2 | SÍ | 12 | 8 | - | 4 | 28 | 19 | 9 | 10 |
| 3 | Fleyr | 12 | 5 | - | 7 | 26 | 25 | 1 | 6 |
| 4 | ÍF | 12 | 0 | - | 12 | 2 | 30 | -28 | 0 |